# Vælkomin á Sølutorgið í Vágsbotni






## Reglur fyri at selja á sølutorginum

**Loyvi er at selja:**

| | |
|---|---|
| · Nýveiddan fisk, | Plintur 1-5 |
| · Nýveidd fuglaegg, | Plintur 1-5 |
| · Nýveidda grind og spik, | Plintur 1-5 |
| · Fugl, | Plintur 1-5 |
| · Óskorið grønmeti og eplir | Plintur 6-7 |
| · Fiskavørur frá góðkendum og løggildum virkjum, | Plintur 1-5 |

**NB Fuglur** Minst til skelti, har tað stendur at fuglurin er hagreiddur uttan góðkenning frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni



## Treytir fyri at selja vørur eru:

- Seljarin skal seta seg í **samband** við Snarskivuna á tlf 302010 ella t-post torshavn@torshavn.fo og avtala nær sølan fer fram og á hvørjum plinti.

- **Matvøra** skal ikki liggja beinleiðis á plintunum, men skal vera í íløtum, sum eru egnað til matvørur.
- Seljarin skal handfara matvørurnar rætt og tryggja at matvørurnar, t.e. tær á staðnum loyvdu matvørur burtursæð frá grønmeti, skulu halda temperatur (minni enn 5 °C).
- Grønmeti og eplir skulu ikki seljast á sama plinti sum fiskur, fuglur, grind, spik og egg verða seld.
- Har fuglur verður seldur, skal hanga eitt skelti, sum tilskilar, um fuglurin er hagreiddur uttan góðkenning frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
- Seljarin skal reinsa og spula plintin eftir sølu.

- Seljarar mugu ikki hava **sjúku**, sum vegna smittu kunnu elva til, at vøran gerst óegnað til fólkamat (grein 18 í matvørulógini, løgtingslóg nr. 46/1985).
- **Forboð** er at selja matvørur, sum av eini ella aðrari orsøk ikki eru egnaðar til fólkamat (grein 11, 12 og 13 í matvørulógini, løgtingslóg nr. 46/1985).
- Á sølutorginum er bert loyvi at selja matvørur, sum standa í yvirlitinum "loyvi er at selja".

- **Burturkast** skal beinast burtur av økinum minst einaferð dagliga og beinast burtur á ein fullgóðan hátt, samsvarandi kommunalu skipanini.
- Bingja til vanligt burturkast stendur við bátafelagið. Tórshavnar Havn tømir bingjuna eftir tørvi.
- Bingja til lívrunnið burturkast stendur á Vestaru bryggju, innan fyri egningarskúrarnar. Tórshavnar Havn tømir bingjuna einaferð um vikuna.

## Vesi:

- Vesið er til seljarar í Mylnugøtu.
- Upplatingartíðirnar eru hesar:
  - summartíð (1. mai – 15. oktober):
    - mánadag – leygardag kl. 8.00 – kl. 20.00
    - sunnudag kl. 12.00 – kl. 20.00
  - vetrartíð (16. oktober – 30. apríl):
    - mánadag – leygardag kl. 8.00 – kl. 17.00
    - sunnudag kl. 12.00 – kl. 17.00

**Reglurnar fyri sølutorgið skulu virðast!**

**NB. Sølutorgið er undir eftirlitið av Tórshavnar kommunu og Heilsufrøðiligu starvsstovuni.**